# Alfred og Karsten kunnu vænta broytingar

Sambandsflokkurin vil nú hava at nevndirnar hjá Løgtingum verða valdar av nýggjum.

Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins hevur í dag skrivað Løgtinginum bræv, har hann heitir á Løgtingið um at samtykkja at velja tingnevndirnar av nýggjum.

Løgtingið skal so atkvøða um málið.

Kaj Leo Johannesen vísir á, at broytingar eru gjørdar í samgonguflokkuni síðani hon varð skipað og tí heldur hann at tað er frægast at velja tingnevndingar av nýggjum.

Her sipar hann til, at Alfred Olsen er hevur boðað frá, at hann stuðlar ikki samgonguna longur.

Hinvegin fær hetta helst eisini avleiðingar fyri Karsten Hansen, sum er farin úr Tjóðveldisflokkinum, upp í Miðflokkinum. Men hann umboðar framvegis Tjóðveldisflokkin í fíggjarnevndini og í Landsstýrismálanevndini

Á tingfundi í morgin árini fer Løgtingið at atkvøða um nevndirnar skulu veljast av nýggjum ella ikki.

# Sosiala eftirlitið er avgerandi

**Bent Jacob Hansen, leiðari í varðhaldinum, sigur, at í dag er talið nakað hægri, enn tá kanningin varð gjørd. – Tá kreppan kom fall kriminaliteturin. Tað er eitt serføroyskt fyribrigdi, men nú er talið hækka nakað og komið í eina javna legu, heldur hann**

FONGSUL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Bent Jacob Hansen, varðhaldsleiðari, minnist væl, tá kanningin hjá King's College í London varð gjørd herfyri.

– Tað komu nakrir fyrispurningar frá einum universiteti, sum gjørdi eina kanning. Har varð spurt um miðaltøl og hvørt av sínum, svarar Bent Jacob Hansen, tá vit spyrja hann, um hann kennir nakað til tølini og kanningina, vit leggja fram fyri honum.

Bent Jacobsen Hansen starvast dagliga sum leiðari í varðhaldinum. Hann hevur tí sínar metingar um, hvussu tað ber til, at talið av innsettum er so lágt í Føroyum.

– Tá tey seint í 2005 hava spurt um miðaltal av innsettum her, hava tey fingið miðaltalið fyri 2004, tí vit hava einki annað miðaltal havt tá.

– Tá var kreppan yvirstaðin og talið av innsettum byrjaði spakuliga at vaksa aftur.

Tað er ikki av tilvild, at Bent Jacob Hansen nevnir kreppuna.

– Vit upplivdu nakað serliga føroyskt undir kreppuni, sum ikki er sætt aðrastaðni. Hjá øllum øðrum londum økist kriminaliteturin í krepputíð, men her upplivdu tað beint øvugta, har kriminaliteturin minkaði sum kreppan kom, fortelur Bent Jacob Thomsen.

Hann leggur beinanvegin dent á, at minkandi kriminaliteturin ikki komst av, at øll tey, sum annars stóðu fyri hesum, fluttu av landinum, tá ringu tíðirnar tóku við.

– Tað er enn soleiðis, at vit koma hvørjum øðrum við her í Føroyum. Vit hava nøkur serstøk virðir, sum vit virðismeta høgt, fortelur Bent Jacob Hansen, og sipar til felagskensluna, sum er millum føroyingar.

– Eg havi viðgjørt og kjakast um hetta við mínar donsku starvsfelagar, sum halda, at hetta er heilt serligt fyri Føroyar.

## Nú 11,65

Bent Jacob Hansen greiðir frá, at frá 2003 og frameftir er talið vaksið javnt, soleiðis at dagliga miðaltalið fyri fólk, sum sótu í inni í fjør var 11,65.

– Nú er talið komið upp-aftur á tað, sum var vanligt, sigur Bent Jacob Thomsen, sum heldur at miðaltalið er komið í eina nøkulunda fasta legu aftur, eftir fallið í og eftir kreppuárini.

## Sosialt eftirlit

Men um vit ganga út frá, at tølini hjá hinum londunum á listanum ikki er vaksin, so høvdu Føroyar kortini verið millum aftastu londini á listanum, um miðaltalið 11,65 varð brúkt. Er tað nøkur serlig orsøk til, at talið er so lágt, ella skikka vit okkum bara betur í Føroyum?

– Tað er støddin á samfelag okkara. Vit vita øll hvør er hvør her. Tá onkur kemur inn til okkum, so sigur bara eftirnavnið hvaðani tú ert og hvør familjan er. Aðrastaðni eru fólkini bert CPR-nummur fyri hvørjum øðrum, heldur Bent Jacob Thomsen, leiðari í varðhaldinum.

# Fútin ikki bilsin

**– Tað er gleðiligt, at tað ikki eru so nógv, sigur varafúti Finn Ougaard, sum ikki er bilsin av, at Føroyar hava so fá fólk sitandi inni**

FONGSUL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Finn Ougaard, varafúti, samanber støðuna hjá Føroyum í altjóða samfelagnum, við munin á kriminalitetinum í eini lítlari bygd í Vesturjyllandi og Keypmannahavn.

– Vit hava eitt lítið og tætt samfelag. Hetta merkir at vit hava eitt stórt sjálvkontrol, sigur Finn Ougaard.

Varafútin kendi ikki til tølini, áðrenn vit kunngjørdu tey fyri honum. Kortini er hann ikki bilsin.

– Nei, tað eri eg ikki. Hatta hongur væl saman, sigur Finn Ougaard.

Hann metir at virðingin fyri hvørjum øðrum er avgerandi fyri, hvussu støðan viðvíkjandi kriminalitetinum sær út. Somuleiðis hevur hann hug at nevna stóra fyribyrgjandi arbeiði, sum verður gjørt.

– Fyribyrgjandi arbeiði er øgiliga týdningarmikið, og har verður eisini gjørt eitt stórt arbeiði at kunna eitt nú skúlanæmingar um kriminalitet og hvørjar avleiðingar tað hevur, sigur varafúti Finn Ougaard.

## Fakta

- Meir enn 9,25 milliónir fólk sita fangar í fongslum kring heimin.
- Nærum helmingurin av hesum eru í USA, Kina og Russlandi
- 61% av øllum heimsins londum liggja undir 150 fangar í miðal per 100.000 íbúgva

## Keldur

World Prison Population List, seventh edition - Roy Walmsley, International Center for Prison Studies, King's College, London.

www.prisonstudies.org

